Starvslýsing

Heimatænastan

## Leiðari til dagtilhaldið Dalalon

Søkt verður eftir leiðara til Dalalon, sum er sjálvstøðugur stovnur undir Nærverkinum. Dalalon er demensdagtilhald í Havn, sum er opið í dagtímunum allar yrkadagar.

Starvið er eitt avbjóðandi og áhugavert starv innan demensøkið. Á stovninum verður arbeitt eftir nýggjastu umsorgsteoriunum.

**Førleiki:**
Til starvið krevst útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur við eftirútbúgving sum demenssamskipari. Tað er ein fyrimunur at hava leiðsluroyndir.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Gunnleyg Durhuus, leiðara fyri eldraøkið, á tlf. 304020 ella hjá Ernu Háberg, leiðara, á tlf. 318102 ella 228004.

**Umsókn:**
Umsókn við viðmælum, upplýsing um útbúgving og royndir v.m. skal sendast til:

Nærverkið
Eirargarður 2, 2. hædd
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað: Gunnleyg Durhuus,
leiðari fyri eldraøkið

**Umsóknarfreist: 16. apríl 2007.**

## Náttarvakt til Heimatænastuna í Suðurstreymoy

Almanna- og Heilsumálaráðið hevur avgjørt at seta í verk eina royndarskipan við koyrandi náttarvakt í Suðurstreymoy.

Vit sóknast eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum ella heilsuhjálparum til tíðaravmarkað starv at arbeiða í skiftandi vaktum, skjótast gjørligt.
Arbeiðið umfatar røkt og umsorgan til heimabúgvandi borgarar og til búfólkini á báðum eldrasambýlunum í Øki 1.

Starvið er tíðaravmarkað til 31.12.2007, tá ið skipanin verður eftirmett.

**Setan, umsókn og freist:**
Starvið verður sett 1. mai 2007 ella skjótast til ber.
Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.
Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils Heimatænastan í Suðurstreymoy.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til økisleiðaran á tlf. 317249.
Send eina umsókn við prógvi, autorisatión, møguligum viðmælum og ynskjum um setanarbrøk til:

Heimatænastan
Skálatrøð 14
Fo-100 Tórshavn
Stílað: Meta av Fløtum, økisleiðari

**Umsóknarfreist: 16. apríl 2007.**

**Les meira á heimasíðuni www.naerverk.fo / leys størv**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**



Havnar Bio

kall Coca-Cola




**Mr Bean** HEIMSFRUMSÝNING

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 30.03 | kl 19.00 | kl. 21.15 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 31.03 | kl 19.00 | kl. 21.15 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 01.04 | kl 18.00 | kl. 20.15 | kl. 22.30 |




**Number 23**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 30.03 | kl. 20.45 | kl. 23:00 |
| Leygardag | 31.03 | kl. 20.45 | kl. 23.00 |
| Sunnudag | 01.04 | kl. 22.00 | |




**Norbit**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 30.03 | kl. 18.15 |
| Leygardag | 31.03 | kl. 18.15 |
| Sunnudag | 01.04 | kl. 19.30 |

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**
**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**





Tín stóri dagur

Takka í Sosialinum



Leygarkvøldið spæla

# Bridge

Atgongumerki kr. 60,- fríggja. - leygarkvøld
Ókeypis atgongd áðrenn kl. 00.30
Sunnukvøld er ókeypis atgongd

**Opið er:**

| Mán. - Hós. | Frí. - Leyg. | Sunnudag |
|---|---|---|
| 19.00 - 24.00 | 17.00 - 04.00 | 17.00 - 24.00 |

Tórshøll

Sverrisgøta 22, Tórshavn, tlf. 311565, fax 311585

Sosialurin 341800